FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Innanhýsis**
17. mai 2011
Mál: 11/00238-2
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: AK/KM

# Upprit

**Um** skipan av fiskiskapinum eftir makreli hjá føroyskum skipum í 2011.

**Málslýsing**
Høvuðstættirnir í hjálagda uppskoti til kunngerð um fiskiskapin eftir makreli hjá føroyskum skipum í 2011 eru hesir:

1) Heildarkvota: Ásett verður eitt hámark fyri veiðu av makreli í føroyskum sjógvi upp á 150.000 tons í 2011.

2) Tøk kvota til føroysk skip: Føroyar hava í sínámillum fiskiveiðisamráðingum við Russland og Ísland latið ávikavist 25.500 tons og 1.300 tons burturav føroysku makrelkvotuni. Eftir at luta út til føroysk fiskifør eru sostatt 123.200 tons.

3) Býtið: Politisk semja er um, at 5.000 tons av føroysku kvotuni skulu setast av til vísindaligar royndir. Eftir eru 118.200 tons at lata skipum undir føroyskum flaggi at fiska. Sambært semjuni skulu 35.000 tons lutast út til nótaskipini uttan gjald, ímeðan restin av tøku føroysku makrelkvotuni skal útlutast við avgjaldi og seljast. Sambært semjuni verður kvotan latin føroyskum fiskiførum soleiðis:

   i. 35.000 tons verða tillutað eigarum av fiskiførum, sum í 2009 høvdu rætt til fiskiloyvi at fiska makrel í føroyskum sjógvi (nótaskip). Hesi tonsini verða latin skipunum sum eginkvota á sama grundarlagi sum í 2009. Hendan kvota verður latin uttan avgjald. Talan er um somu kvotu, sum longu nú er fevnd av kunngerð nr. 31 frá 4. mai 2011um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011. Hendan kvota verður tikin við í hesa kunngerð, samstundis sum fyrr nevnda kunngerð verður sett úr gildi.

   ii. 63.200 tons verða útlutað móti gjaldi við tað, at 25 oyru verða løgd á hvørt fiskað kg. Gjaldið verður avroknað við avreiðing. Avgjaldskvotan verður latin til tveir bólkar:

      - 25.000 tons verða tillutað eigarum av fiskiførum, sum í 2009 høvdu rætt til fiskiloyvi at fiska makrel í føroyskum sjógvi (nótaskip). Kvotan verður latin skipunum sum eginkvota á sama grundarlagi sum í 2009.
      - 38.200 tons verða tillutað øllum øðrum fiskiførum undir føroyskum flaggi enn nótaskipunum. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki.

Ministry of Fisheries
Bókbindaragøta 8 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Hámarkið í hvørjum fiskiloyvi verður sett til 4.000 tons. Hetta skal tryggja, at einki skip kann fiska alla kvotuna undan einum øðrum, at ávís spjaðing verður millum skipini, eins og at møguleiki verður fyri fjølbroyttum fiskiskapi. Til tess at gera skipanina smidliga og at tryggja, at føroyska heildarkvotan verður fiskað, kann landsstýrismaðurin, um útlit eru fyri, at kvotan ikki verður fiskað, hækka ella taka burtur hámarkið.

iii. 20.000 tons verða seld umvegis uppboðssølu.

4) Fiskiloyvi: Av tí at sama fiskifar kann hava kvotu uttan avgjald, kvotu við avgjaldi, kvotu keypt á uppboði og kvotu fyri at gera rannsóknir og royndir fyri Havstovuna, er áseting um, at hesar ymisku kvotur verða útskrivaðar á fiskiloyvi fyri seg. Kunngerðin ásetir eisini, at áðrenn fiskifar byrjar fiskiskap, skal fráboðan sendast Fiskiveiðieftirlitinum um, hvørjum fiskiloyvi fiskað verður av.

5) Hjáveiðireglur: Royndirnar við fiskiskapi eftir makreli í føroyskum sjógvi vísa, at tað summastaðni illa slepst undan hjáveiðu av norðhavssild. Tí mugu hjáveiðireglur setast fyri hjáveiðu av øðrum uppsjóvarfiski, tá roynt verður beinleiðis eftir makreli.

Øll tann føroyska strandarlandakvotan av t.d. norðhavssild og svartkjafti er útlutað nótaskipum og ídnaðarskipum.

Tí er ætlanin at gera hjáveiðireglurnar soleiðis, at hjá fiskiførum, sum hava fiskiloyvi at fiska annan uppsjóvarfisk, ið er undir kvotuskipan, verður hjáveiða loyvd og roknað av hesum kvotum.

Hjá fiskiførum, ið ikki hava kvotu av øðrum uppsjóvarfiski, sum er undir heildarkvotuskipan, kann hjáveiðan av nevndu fiskasløgum í mesta lagi vera 5 % av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin.

Samlaða hjáveiðan av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur má hvørki fyri hvørt hál ella fyri hvørja avreiðing vera meiri enn 2 % av samlaðu veiðuni fyri túrin ella hálið.

6) Aðrar ásetingar í uppskotinum til kunngerð snúgva seg um reglur um partroling, forboð at blaka veiðu útaftur, tekniskar reglur um undirmátsmakrel, meskar og útgerð umborð.

7) Umskiping: Fyri at tryggja hagtøl og eftirlit, skulu serstakar treytir ásetast skipum, sum ætla sær at umskipa, lata ella taka ímóti makreli frá øðrum skipi. Lagt verður upp til, at fiskifør/før, sum ætla sær at umskipa/lata ella taka ímóti fiski, skulu senda umsókn til Fiskimálaráðið.

8) Fiskiskapurin eftir kvotu uttan avgjald og kvotuni til vísindaligar royndir er longu skipaður í kunngerð nr. 31 frá 4. mai 2011 um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011. Hesar kvotur eru eisini fevndar av nýggju kunngerðini, og fyrr nevnda kunngerð verður tí sett úr gildi.

## Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar

Mett verður ikki, at kunngerðin hevur fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Tó kann økta virksemið føra við sær, at eftirlitsuppgávurnar á sjógvi og landi verða fleiri. Fyri vinnuna merkir tað, at føroysk skip fáa rúmari møguleikar at fiska makrel í føroyskum sjógvi í 2011.

| Yvirlit – makrelur í føroyskum sjógvi | | |
|---|---|---|
| **Heildarkvota** | | 150.000 tons |
| **Latið øðrum:** | Russlandi: | 25.500 tons |
| | Íslandi: | 1.300 tons |
| **Tøk kvota til føroysk skip** | | **123.200 tons** |
| **Kvotan uttan gjald** | Nótaskip | 35.000 tons |
| **Kvota við avgjaldi** | Nótaskip | 25.000 tons |
| | Onnur | 38.200 tons |
| **Kvota á uppboðssølu** | | 20.000 tons |
| **Samanlagt til føroysk skip** | | **118.200 tons** |
| **Til vísindaligar royndir** | | 5.000 tons |